# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um Magna Nólsøe



**Føddur 8. juli 1988 - deyður 27. oktober 2005**

Góði Magni

Bert nøkur orð vilja okur, ið eftir sita við stórari sorg, skriva niður her.

Ringt er at seta orð á tær kenslur, man situr við aftaná eina slíka syrgiliga hending.

Øll spyrja hví, hví ein so raskur, fittur og góður 17 ára gamal drongur skuldi vera rivin frá hesi verð so brádliga og meiningsleyst. Men eingin veit at siga hví! Kanska hann bara var ov góður til at vera her, ella kanska Guð onkursvegna hevur tørv á honum. Líkamikið hvat, so er hann farin og kemur ikki aftur, og hart er tað, tað er vist.

Tað er altíð ringt at missa, um viðkomandi er ungur ella gamal, men tað at Magni hvørki var sjúkur ella illa fyri, og so bara doyr, er ófatuligt. Tankar okkara leita til tey nærmastu ið eftir sita, Vígdis, Curt og Unu. Ikki kunnu okur ímynda okkum, hvussu tað man vera at missa ein son og bróður; Gud veri við tykkum og hjálpi tykkum ígjøgnum sorgina.

Góði Magni, okur sakna teg; tú kemur altíð at hava eitt pláss í okkara hjørtum.

Okur vita, at tú hevur tað gott, har ið tú ert nú, og ein dag vit hittast aftur; men til ta tíð mást tú hava tað gott.

Okur elska teg.

**Vinirnir**

## Minningarorð um Magna Nólsøe

**Føddur 8. juli 1988 - deyður 27. oktober 2005**

Hvør vildi trúð at okur skuldu sita her og skriva minningarorð um teg góði Magni, sum so brádliga varð tikin burtur frá okkum, bert 17 ára gamal.

Tú var okkum øllum ein góður vinur, altíð vart tú fittur, hjálpsamur og álítandi og ikki minst í skúlanum vart tú sera raskur.

Okur fara aldrin at gloyma allar tær góðu løturnar, okur høvdu saman, serliga tey hugnaligu leygarkvøldini. Ja, sjálvt tað seinastu tíðina nýtti tú við tínum vinum, tá tykor vóru á Eiði og spældu fótbólt.



Tað er sera torført at skilja, at tú ikki ert her ímillum okkum longur, saknurin er stórur. Men øll tey góðu minnini um teg, koma vit altíð at eiga, og hettar er okkum ein stór troyst.

Góði Magni, tú kemur altíð at hava eitt serligt pláss í okkara hjørtum.

Okur hugsa við samkenslu um Curt, Vígdis og Unu, nú tit hava mist ein kæran son og bróður, má Gud styrkja tykkum.

Hvíl í friði kæri vinur

**Floksfelagarnir 10.a og 10.b**

Heidi Glerfoss, 3-arin:

## Høvuðsuppgávu um trúlovilsis- og vígsluringar

**TÍÐINDASKRIV**

Í hesum døgum ger Heidi Glerfoss úr 3-arnum høvðusuppgávu um trúlovilsis- og vígsluringar. Í hesum sambandi ber til at støkka inn á gólvið og fáa eitt prát við Heidi og síggja úrvali av ringum. Eisini ber til at verða við at sniðgeva sínar egnu ringar við tí vælumtøkta programminum Love Design. Til ber at ringja til 3-aran á 353535 og frætta meira.




## Dagurin í morgin

**11. januar. Hyginus**, deyður umleið ár 142. Valdur pávi í 138, men varð fyribeindur, tá ið keisarin Antonius Pius forfylgdi teimum kristnu.

†

Okkara góða systir

**Marjun Dalsgaard**
fødd Johannesen, ættað av Skála

✻ 2. august 1929 † 7. januar 2006.

Børan fer frá Luthers Kirkju í Keypmannahavn hósdagin 12. januar kl. 12.00.

*Familjunnar vegna*

**Ingibjørg og Leivur**




**Fært tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo

## Prógv

2. januar 2006 tók Bjørg Hentze, Tórshavn, prógv sum professions bachelor í kosti og heilsu (human ernæring) á Suhrs Seminarium í Keypmannahavn.

## Rætting

Rætting til greinina "Ein gravsteinur spøkir aftur" í innlegginum Jól&Nýggjar í Sosialinum 23. desember.

Vinarliga, og orsaka at eg mistók meg í fartinum við at siga at J.A. Arge, kallaður Jampan, stóð fyri arbeiðinum á Fiskieiðinum í Hvalba og havnini í Skopun. Hetta var ikki rætt.

**Jákup Andreas Arge**